HEILSUMÁLARÁÐIÐ

16. september 2013
Mál: 13/00457-31
Viðgjørt: Birita Ludvíksdóttir

**Vegleiðing um gjald fyri ferða- og uppihaldsútreiðslur uttanlands fyri fylgjara hjá sjúklingi**

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 14. mai 2013 og Kunngerð nr. 90 frá 27. september 2006, sum seinast broytt við kunngerð nr. 114 frá 10. september 2013, kann sjúkrahúsverkið bera ferða- og uppihaldsútreiðslur fyri fylgjara hjá sjúklingi, ið verður sendur uttanlands til viðgerðar. Í hesari vegleiðing verða ásetingarnar í lóg og kunngerð nærri útgreinaðar.

*Treytin fyri at vera fylgjari*
Treytin fyri at kunna verða fylgjari er, at fylgjari er myndugur, og er førur fyri at átaka sær uppgávuna sum fylgjari. Fylgjari skal ikki hava aðrar ábyrgdir, meðan viðkomandi er fylgjari hjá sjúklingi.

Við "fylgjara" er at skilja persónar, í flestu førum avvarðandi, ið eru um sjúklingin undir viðgerð uttanlands, og á ferðini til og frá viðgerðarstaðnum. Talan er í hesum førum ikki um heilsustarvsfólk.

Í "uppgávuni sum fylgjari" liggur, at fylgjarin ferðast við sjúklinginum til viðgerðarstaðið, er um sjúklingin undir viðgerð uttanlands, og um sjúklingurin hevur tørv á tí, ferðast saman við sjúklinginum heimaftur til Føroya. Um sjúklingur hevur tørv á tí, er uppgávan sum fylgjari sostatt ikki liðug fyrr enn sjúklingurin er komin heim aftur.

*Avgerð í málum um fylgjara*
Í kunngerðini er ásett, at "fyrisitingin innan sjúkrahúsverkið" tekur avgerð í málum um fylgjara. Á Landssjúkrahúsinum er tað Uttanlandstænastan, sum tekur avgerð í málum um fylgjara, meðan tað á Suðuroyar- og Klaksvíkar sjúkrahúsi er fyristøðukvinnan, ið tekur hesa avgerð.

Tað kemur javnan fyri, at sjúklingar verða sendir bráðfeingis til viðgerðar uttanlands í úrtíð, t.v.s. uttanfyri vanliga arbeiðstið. Í hesum førum kann fyrisitingin delegera ábyrgdina at játta gjald fyri fylgjara til ein yvirlækna, ið starvast innan sjúkrahúsverkið.

Fyrisitingin innan sjúkrahúsverkið metir í hvørjum einstøkum føri, um sjúklingur lýkur treytirnar fyri at fáa fylgjara, og um tað er neyðugt hjá einstaka sjúklinginum at hava fylgjara við sær uttanlands.

Í málum um fylgjarar skal fyrisitingin tryggja, at flutningur fer fram á bíligasta og ráðiligasta hátt. Hetta merkir, at ferðakostnaðurin ikki skal fara upp um tað, sum krevst fyri at sjúklingur

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo

kann ferðast trygt og sømiliga í mun til ítøkiligu heilsustøðuna. Um fylgjari ynskir at broyta ferðaseðilin, ber fylgjarin møguligan kostna av hesum.

*Í hvørjum førum kann sjúkrahúsverkið bera ferðaútreiðslurnar fyri fylgjara*
Tá ið fyristingin innan sjúkrahúsverkið metir, at sjúklingur, vegna lívshóttandi sjúku, ella vegna likamligt, sálarligt ella sosialt ófullføri, ikki er førur fyri at ferðast ella uppihalda sær einsamallur uttanlands, kann sjúkrahúsverkið bera ferðaútreiðslur fyri ein fylgjara. Niðanfyri verður nærri útgreinað, hvat liggur í hesum ymisku hugtøkunum.

Tá ið fyrisitingin innan sjúkrahúsverkið metir, at tað ikki er neyðugt at hava fylgjara alla viðgerðartíðina, kann fyrisitingin taka avgerð um bert at bera ferðaútreiðslur fyri fylgjara partar av viðgerðartíðini.

Við *lívshóttandi sjúku* er at skilja eitt nú bráðfeingis lívshóttandi sjúku, tá ið útlit eru fyri at støðan kann versna munandi og tá ið diagnosa verður sett um lívshóttandi sjúku. Meting má í hvørjum einstøkum føri gerast av, hvørt tað er neyðugt at hava fylgjara við. T.d. er tað neyðugt at hava fylgjara við, tá diagnosa verður sett um lívshóttandi sjúku, men hinvegin er ikki neyðugt at hava fylgjara við, um umstøðurnar eru støðugar. Hetta kann t.d. vera um talan er um sjúklingaferðir til vanligar útvortis kanningar, afturvendandi kontrolvitjanir, krabbameinssjúklingar, sum ferðast til kontrolvitjanir ella cytostatiska viðgerð (kemoviðgerð), har hjáárin ikki væntast fyrr enn aftaná heimkomu til Føroyar, ikki lívshóttandi skurðviðgerðir, hjarta/æðrakanning har ikki verður roknað við krúnæðrasjúku, sum krevur opna skurðviðgerð. Sum dømi um hetta seinasta kann sigast, at hjartasjúklingar, sum bráðfeingis eru viðgjørdir fyri blóðtøpp á sjúkrahúsi og verða bráðfeingis sendir niður til hjarta/æðrakanning vanliga ikki fáa fylgjara við. Hetta av tí, at sjúklingurin í hesum førum vanliga er uttanfyri lívsvanda. Hesir hjartasjúklingar fáa í flestu førum heilsustarvsfólk við, sum skulu tryggja fakliga eftirlitið undir sjálvum flutninginum og veita viðgerð, um hetta er neyðugt. Í teimum førum, har tað hendir, at sjúklingurin á Ríkissjúkrahúsinum fær at vita, at hann skal til opna skurðviðgerð, sosum bypass, verður fylgjari sendur eftirfylgjandi, frá tí tíðspunkti, sjúklingurin hevur fingið boðini um skurðviðgerð.

Við *sálarligt ófullføri* er at skilja eitt nú sjúklingar, ið hava sálarsjúku ella meinngartarn.

Við *likamligt ófullføri* er at skilja eitt nú sjúklingar ið sita í koyristóli ella á annan hátt eru ófullførir, t.d. vegna aldur, ferðsluvanlukku ella aðra vanlukku. Um sjúklingur t.d er illa gongdur og hevur trupuleikar at bera viðføri o.a., so ber til at stíla fyri praktiskari hjálp á staðnum og er hetta ikki at rokna sum heilt serlig viðurskifti.

Við *sosialt ófullføri* er at skilja sjúklingar, ið hava álvarsligar trupulleikar við at ferðast og uppihalda sær einsamallir uttanlands, hóast talan ikki er um likamligt ella sálarligt ófullføri. Um sjúklingur hevur trupult við at finna og at skilja málið, ber til at stíla fyri praktiskari hjálp á staðnum. Sama er galdandi um sjúklingur hevur flúgviskrekk – tá er møguleiki at sigla/ferðast við skipi.

Tað er ikki møguligt úttømandi at siga, í hvørjum førum sjúklingur kann fáa fylgjara við. Sjúkrahúsverkið má í hvørjum einstøkum føri gera eina meting um sjúklingur eigur at fáa fylgjara við sær til viðgerð uttanlands.

*Fylgjari til børn og ung, undir 18 ár*
Er sjúklingur yngri enn 18 ár, kann sjúkrahúsverkið bera ferða- og uppihaldsútreiðslur, so ein fylgjari kann fara við sjúklinginum uttanlands, uttan mun til um treytirnar í §§ 7 og 8 í kunngerðini eru loknar.

Sum meginregla ber sjúkrahúsverkið ferða- og uppihaldsútreiðslur, soleiðis at eitt av foreldrunum, kann fara við barni uttanlands til viðgerðar.

Í serligum førum kann sjúkrahúsverkið tó bera ferða- og uppihaldsútreiðslur, soleiðis at bæði foreldrini kunnu fara við barni uttanlands til viðgerðar. Her kann talan vera um barn ella ungan, ið hevur álvarsligt brek, sosum fjølbrekað, ella lívshóttandi sjúku, ella barn ella ungan, ið fer at fáa staðfest álvarsama diagnosu, sosum menningartarn, autismu ella lívshóttandi sjúku. Eitt atlit at taka í hesum føri er eisini aldur á barninum.

Er talan hinvegin er umstøður sum eru støðugar, t.d. tá ið talan er um kontrolvitjanir v.m., játtar sjúkrahúsverkið sum meginregla ikki tveir fylgjarar at fara við einum barni.

Atlitini, ið fyrisitingin innan sjúkrahúsverkið eigur at taka, tá umræður avgerð um at loyva tveimum fylgjarum, eru áleið tey somu, sum nevnd omanfyri undir *"Í hvørjum førum kann sjúkrahúsverkið bera ferðaútreiðslurnar fyri fylgjara"*.

Tá ið avgerð verður tikin um at bera ferðaútreiðslur fyri fylgjara til børn og ung undir 18 ár, er tað sum meginregla foreldur at barninum, ið fara við sum fylgjari. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann sjúkrahúsverkið tó bera ferða- og uppihaldsútreiðslur, soleiðis at onnur enn foreldur kunnu fara sum fylgjari við barninum.

*Sjúkralega í longri tíðarskeið*
Um ein sjúklingur sum hevur fingið fylgjara, vísandi til omanfyristandandi, liggur sjúkur uttanlands í 4 vikur ella longri, kann sjúkrahúsverkið bera útreiðslurnar av, at fylgjarar kunnu skiftast um at fara uttanlands at vera um sjúklingin, so ein fylgjari kann vera skiftur út aftaná 4 vikur.

Ynskja fylgjarar at skiftast um at vera um sjúklingin í styttri tíðarskeið, bera fylgjararnir sjálvir ferðaútreiðslurnar. Sjúkrahúsverkið ber tó uppihalds- og kostútreiðslurnar hjá viðkomandi.

*Uppihaldsútreiðslur*
Sjúkrahúsverkið ber uppihalds- og kostútreiðslur á Sjúklingahotellinum Tórshavn fyri teir fylgjarar, ið fáa ferðaútreiðslurnar goldnar sambært omanfyristandandi.

Um ein sjúklingur verður viðgjørdur uttanfyri økið Region Hovedstaden, ber sjúkrahúsverkið uppihalds- og kostútreiðslur á tí ávísta sjúklingahotellinum fyri fylgjarar, ið fáa ferðaútreiðslur goldnar sambært kunngerðini.

Tó rindar fylgjari 150,00 kr. um samdøgrið fyri uppihald á Sjúklingahotellinum Tórshavn og á øðrum ávístum sjúklingahotellum o.l., har matur er íroknaður uppihaldinum, tó í mesta lagi 1.500,00 kr. um mánaðin.

Velur fylgjari annað uppihaldsstað enn tað, sum sjúkrahúsverkið hevur ávíst viðkomandi, ber fylgjarin sjálvur uppihalds- og kostútreiðslurnar, ið standast í hesum sambandi.

Fylgjari, ið hevur fingið játtað ferða- og uppihaldsútreiðslur frá sjúkrahúsverkinum, skal nýta sama uppihaldsstað sum sjúklingurin.

Heilsumálaráðið, 16. september 2013

**Karsten Hansen**
landsstýrismaður

/Turid Arge